

*Lisa, Martin Joensen og Jacob Olsen. Hesin seinasti, ið eisini var úr Sandvík, var lærari og umsetari*

ar, fáa vit ábendingar um í teimum ummælum, hann læt koma á prent í Føroya Sosial-Demokrati. Um bókina Aðru Ferð eftir Victor Danielsen skrivar Martin m.a.:

Men bókin hevur tað lýti, at hon er tað, sum menn kalla »tendentiøs«. Hon gevur greidliga til kennar, hvat høvundurin ætlar og hvørjum parti hann er við.

Og seinni skrivar hann:

Men tað kemur týðiliga fram, at tað bert er ein flokkur, ið er hin útvaldi og har Kristus er at finna ... Øll fólkini í hinum partinum, tí verðsliga og gudleysa, eru sera ódámlig, meðan hini eru lýtaleys.

Um eina aðra bók, Hamranna Børn eftir Richard B. Thomsen, skrivar Martin:

Kynstrið er tað at kunna skapa heildarmyndina so, at vit hugtakast og trúgva uppá tað.

»Hamranna Børn« hevur persónlýsingar, sum vit ikki trúgva uppá. Kvinnur hennara eru uppi í einari hædd, sum ein illa kennir seg heima í, persónarnir eru antin svartir sum náttin ella ljósir sum sólin.

Martin Joensen nemur her við ta knívsegg, sum mangur rithøvundur skal riðja á. Lívssjónin - sjónarmið um politikk, átrúna og samfelag - kann vera virðismikil, kann vera tann drívmegi, sum eggjar høvundinum at skapa, men samstundis skal hann, tá hann myndar sínar persónar, vera leysur av hesi somu lívssjón. Hann er, kundi ein sagt, í somu støðu sum Ásla Sjúrðardóttir, sum kvøðið verður soleiðis um í Ragnars kvæði:

*Bið hana koma til skips í morgin,*
*hava við sær svein,*
*hava tann svein, sum ikki er svein,*
*og koma so búgvin heim.*

## Divide et impera

Áðrenn nomið verður við, hvussu Martin Joensen sjálvur megnar hesa avbjóðing, skal eg venda aftur til eitt høvuðsevni í hansara skaldskapi. Fiskimenn lýsir viðurskiftir og mótsagnir millum øðrumegin reiðara og útgerðarmann og hinumegin teir sum veiða og tey sum tilvirka fiskin.

Ein spurningur í hesum mótsagnum er frábýtisrætturin, t.e. rætturin hjá fiskimonnum til at ráða yvir sínum parti av veiðuni og eitt nú selja hann, har mest fæst fyri fiskin. Í Fiskimonnum verður hesin rættur lýstur sum ein rein formalitet ella eitt eiti. Fiskimenninir sum heild hætta sær ikki at brúka henda rætt, og lesarin heldur seg vita, at gjørdu teir tað, hevði tað fingið avleiðingar fyri teir.

Ein annar spurningur er viðurskiftini millum fiskafólkið á landi og fiskimenninar, ella millum úrtøkuna hjá fiskimonnunum og lønir hjá fiskagentunum. Her eydnast tað Kristiansen reiðara og umsjónarmanninum Poul Edvardi at fáa teir flestu av manningini á Ørnini at halda, at tað er fiskafólkið á landi, sum trýstir teirra lønir niður. Og tá ið fiskagenturnar leggja arbeiðið niður, fáa tær ongan stuðul frá fiskimonnunum, tvørturímóti.

Vit kunnu siga, at her verða - helst ella kanska ómedvitað - brúktar tær snildir, sum hava tað latínska heitið divide et impera, t.e. »fá klandur í og hav valdið«.

## Reiðarin sum kongur

Um vit nú spyrja, hvat er tann djúpara orsøkin til hesa valdsstøðu, ella ein av grundunum til hana, so fáa vit ein hóp av ábendingum, ikki av tí skildæmdu frásøgnini, men av myndburðinum ella metaforunum í tekstinum.

Skrivstovan hjá Kristiani Kristiansen verður í skaldsøguni rópt eitt »hásæti«, bókin, har skuld og vinningur hjá fiskimannahúskjum eru uppskrivað, er ein »dómsbók«, sum stundum ger ein »dómadagsbrest«, og um Kristiansen sjálvan verður sagt, at hann og hansara forfedrar eru settir at byggja fiskiplássið upp av »teirri alvísu forsjón«, og sjálvur er reiðarin »prestaligur« og kennir seg sum »høvuðsprest í einum templi«.



*Martin Joensen og Rasmus á Stykkinum*

Hetta eru bara nøkur fá av mongum dømum um, hvussu reiðarans støða á stórplássinum verður lýst. Hann er prestur, kongur, hann er settur av Gudi, hann er Várharra sjálvur, við myndugleika til at gera rætt og skjal á evsta degi. Ei undur í, um fiskimenn hugsa seg um tvær reisur, áðrenn teir brúka sín frábýtisrætt ella á annan hátt seta seg upp ímóti reiðarans valdi. Hvør vágar at herja á Várharra sjálvan?

## Tann runda lýsingin

Frammanundan er longu sagt eitt sindur um lívssjónina hjá Martini Joensen. Sum politiskt virkandi og hugsandi menniskja tók hann undir við eini lívssjón, sum ikki góðtók at leggja »ræði og makt á einstakra manna hendur«.

Hóast tað er Kristian Kristiansen lýstur sum eitt menniskja, ikki sum eitt ónt menniskja. Hann er ójavnur, stundum findarblíður, stundum sum eitt illveður. Hann hevur rundleika, kunnu vit kanska siga, ella trídimensionalitet: vit síggja hann fyri okkum. Sum hjúnafelagi er hann ikki eydnismaður, og hann hevur sorg av sínum børnum.

Eg skal ikki halda upp á, at allir persónarnir í Fiskimonnum og Tað lýsir á landi eru myndaðir við somu styrki, men ikki fáir eru teknaðir soleiðis, at lesarin heldur seg kenna teir, og teir taka búgv í eins huga. Tann lívsglaða Sára, sum líkasum ikki rúmast í tí gomlu, stirvnu bóndabygdini, men leingist aftur til stórplássið, til dansin og kætið, til gleðina við, at dreingir hyggja at sær og fjeppast uppi í sær.

Ella tak kokkin á Ørnini, hann er skitin og tvitin, óruddiligur, deilir sum ein ólukka, men lesarin heldur seg skilja hann og følir samhuga við honum, niðurundirkomin sum hann er av skuld, eyðmýktur og happaður av sínum skuldhavara, skiparanum, tá hann er drukkin.

Hesir persónar eru nettup ikki bara »óndir ella góðir«, og hesar bøkur eru ikki »tendentiøsar«. Ein av manningini á Ørnini, Sigmundur, er lýstur sum eitt reyp og ein bardagamaður, ódællur, ódámligur, grefligur og svartur í útsjónd. Men tað er Sigmundur, tann at vísa seg ódámligasti maðurin á Ørnini, sum, tá kokkurin er gyrdur í brøkur av síni skuld, sjálvboðin og uttan treytir av nøkrum slag, lánar honum 500 krónur og soleiðis bjargar honum úr sínum trælabandi.

## Dostojevskij

Spurningurin um kærleika ella, rættari sagt, um »holdsins lyst« - sexualitet - er ógvuliga frammarlaga serstakliga í Tað lýsir á landi. Eg fari at taka henda spurningin upp móti endanum á hesi viðgerð. Fyrst havi eg hug at siga eitt sindur, fyrst um um skrivingarlagið hjá Martini Joensen, síðan um Martin sum blaðstjóra og blaðmann.

Hvat viðvíkir bókmentaligum fyrimyndum, hava vit fyribils ikki nógv tilfar at byggja á. Vit vita, at Martin las dúgliga frá ungum árum. Hann kendi sjálvandi verkini hjá sínum starvsbrøðrum í samtíðini, Williami Heinesen, Jørgen-Frantz Jacobsen og Heðin Brú. Hann las Laxness og Hans E. Kinck. Lítil ivi man vera um, at hann las Hans Kirk, helst eisini Johannes V. Jensen, kanska eisini Thomas Mann.

Við vissu vita vit, at hann las Alberto Moravia, og somuleiðis, at hann las russiskar bókmentir, helst eitt nú Gogol og Tolstoj, kanska Turgenjev, men fyrst og fremst Dostojevskij, hvørs Brøðurnir Karamasoff hann nevnir sum eitt verk »tú kanst fara undir ferð eftir ferð«. Vit eiga í hesum sambandi ikki at undirmeta ta bókmentaligu vitan, ein nærlagdur og forvitin lærari kundi fáa á einum ársskeiði á Danmarkar lærarháskúla.

## Nietzsche og Darwin

Tá ið eg las Fiskimenn umaftur, kom eg - uttan at hetta skal takast sum vitnisburður um ávirkan - at hugsa um Jack London og skaldsøgu hansara The Sea-Wolf. Skiparin á Ørnini, tann sterki og grefligi Mortan í Húsi og Gunnar í Brekkuni, ateistur og darwinistur, kunnu báðir, í einstøkum brøgdum, fáa ein at hugsa um Wolf Larsen, skipara á kópaveiðiskipinum Ghost, ið Jack London, ávirkaður av bæði Nietzsche og Darwin, lýsir sum yvirmenniskja og umboð fyri hugtakið survival of the fittest.

Skoytt kann vera uppí her, at týðiligur munur er á skrivingarlagnum í Fiskimonnum og Tað lýsir á landi, ein munur, sum sæst í málburði, setningsbygging, enntá tekseting. Har Fiskimenn sum heild er bygd upp av heldur longum setningum, við innskotum og eykasetningum, er Tað lýsir á landi sett saman av, ofta sera stuttum, høvuðssetningum. Har semikolon setir sín dám á Fiskimenn, er punktum høvuðstekinið í Tað lýsir á landi.

Tað er neyvan ókent, at tá ið rithøvundar fara at gera sær ómak, kann stílurin í støðust líkasum dovna ella litfarast. Fiskimenn tykist óruddilig og eitt sindur frumskógarkend, men tykist samstundis at vera eyðkend av lívi og eini vissari dýpd, Tað lýsir á landi, hinvegin, tykist snøgg og reinfør og av tí sama í støðum ikki so livandi sum hin fyrra bókin. Hómar ein Dostojevskij, hansara longu replikkir og drúgvu setningar, aftan fyri Fiskimenn, so kundi tað meira kvettuta stevið í Tað lýsir á landi mint um Hans Kirk.

*(framhald)*



# Íbúð fyri 50 milliónir



*Eigur tó 50 milliónir liggjandi, kanst tú sessast í hesum sofunum næstu 50 árini. Alt er serliga designað til endamálið*



*Hendan er myndin er av einari av teimum »bíligari« íbúðunum. Hendan er í bólki B, og kostnaðurin má liggja um teir tjúgu milliónirnar.*

## – So kostar viðlíkahald og matur eyka

VITJAN
*Orð og myndir:*
*Heri á Rógvi*

Gott at einki hekk fast í skónum, hugsaði eg. Tað er ikki hvønn dag, at tú sleppur at trína á sovorðið. Íbúðirnar umborð á The World eru allar vakrar. Tær eru í fimm støddum og innrættaðar av fýra ymiskum designarum. Prísirnir eru frá 17 mió til 57 mió! Hendan, vit eru í, kostar góðar 50 milliónir at keypa. Rættari sagt er talan um 50 ára langt leigumál. Fyri tínar 50 milliónir fært góðar 200 fermetrar við reinum. Hendan íbúðin, sum snotuliga og væl orðaða kvinnuliga umboðið vísir mær runt er tann næst størsta av teimum fimm, bólkur D. Har eru trý sovikømør, trý baðirúm við øllum hugsandi hentleikum, stór stova, steroe, video og sjónvarps, stórur nýmótans køkur og so er eisini ein terassa, sum dekkar alla longdina av íbúðini. Tað er stutt sagt reinur luksus.

Kvinnuliga umboðið, sum hevur fingið til uppgávu at vísa mær runt, greiðir mær frá, at hetta er fyrsta skipið, sum sovorðnar køkar á kømørunum. Køkurin hevur allar hentleikar. Hetta við øllum hentleikum kann í roynd og veru nýtast í hvørjum einasta frágreiðandi setningi um kømørini og The World.

Eru 50 milliónir til at liva við fyri eitt hálvtrýss ára leigumál, so mást tú eisini finna teg í, at tú skalt gjalda fyri viðlíkahald av kamari og skipið. Hetta gjald varð ikki upplýst, men neyvan er talan um nakra lítla upphædd. Afturat hesum kemur so at tú, sum búgvandi gestur, skalt gjalda fyri alt, tú keypir, etur og drekkur.

110 íbúðir eru umborð, og enn eru nakrar eftir.



*The World hevur egið kapell, har allur átrúnaður verður dyrkaður*

